Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Námsfrøðingar til Trivnaðartænastuna

Søkt verður eftir 3 námsfrøðingum til Sambýlið og Bústovnin á Rúnarvegi í Runavík til setan 15 mai 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Umsóknarfreist: 11.05.2009.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

---

WWW.KONSERTFELAG.NET



# Duo Stimmhorn

Tónar frá Sveisisku Alpunum við nútíðar íblástri



**Christian Zehnder:**
**Sangur, yvirtónasangur, jodl, bandoneon, bandurria, orgulpípur.**

**Balthasar Streiff:**
**Alphorn, dupultalphorn, alpofon, büchel, kornet, barokktrompet, tuba, geitahorn, sangur.**

**Konsertirnar hjá Duo Stimmhorn verða hesar:**
Í Mentanarhúsinum í Fuglafirði ..... 14. mai kl. 20.00
Í Norðurlandahúsinum ................. 16. mai kl. 16.00

KONSERTFELAGIÐ og NORÐURLANDHÚSIÐ

**KONSERTFELAGIÐ**
POSTSMOGA 1107 · FO-110 TÓRSHAVN

---

# ELDSÁLIR SØKJAST TIL FRÍSKÚLAN Í HAVN

**Hevur tú hug at**

- **arbeiða tvørgreinaligt**
- **sameina tað bókliga, handaliga, musiska, sosiala og fysiska**
- **vera við til at skapa nýggjar leiðir...**

**FRískúlin í Havn søkir eftir tveimum lærarum til komandi skúlaár, 2009-2010.**

Frískúlin í Havn er ein skúli, sum setur næmingin í miðdeplin. Frískúlin í Havn møtir barninum, har tað er menningarliga. Skúlin virkar fyri, at barnið gjøgnum hóskandi virksemi í einum stimbrandi og tryggum umhvørvi mennist, lærir og upplivir gleði í skúladegnum. Skúlin leggur dent á at skapa ein felagsskap sermerktur av virðing og umsorgan fyri hvørjum øðrum.

Grundhugsjónin og skúlabygnaðurin eru lýst í stuttum á heimasíðu okkara www.friskulin.org.

Frískúlin í Havn sameinir skúlagongd og frítíðarvirksemi. Lærarar og námsfrøðingar arbeiða saman at skapa eitt mennandi umhvørvi fyri barnið í eini samanrenning av skúla og frítíðarvirksemi. Undirvísing er skipað í evnistímum og grundtímum. Starvsfólkini skipa fyri, at næmingarnir hava ábyrgd av praktiskum viðurskiftum í skúladegnum.

Í løtuni eru 5 starvsfólk og 32 børn í 1.– 3. flokki í skúlanum. Skúlin veksur støðugt, og skúlaárið 2009-2010 verða umleið 43 næmingar í 1.–4. flokki.

Arbeitt verður bæði í toymi saman við hinum starvsfólkunum og sjálvstøðugt; ráðlegging í samband við undirvísing er saman við starvsfeløgum og er partur av dagligu arbeiðstíðini. Arbeitt við næmingum verður bæði í størri og smærri bólkum.

Søkt verður eftir lærarum til tvey fulltíðarstørv. Arbeiðstíðin er skiftandi. Frískúlin er opin frá kl. 7.50 til 16.45.

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Frískúlanum í hendi í seinasta lagi 4. mai 2009.

Meira fæst at vita við at venda sær til skúlan tlf 32 81 50, Sharon Weiss tlf 22 86 53 ella Eyðbjørg Dalsgaard tlf 51 03 14.

**Frískúlin í Havn**
Undir Borgarhálsi 44
176 Velbastaður
tlf. 32 81 50

---

# Føroya Astma- & Allergifelag

Føroya Astma- & Allergifelag hevur aðalfund í MBF húsinum, Íslandsvegur 10

Leygardagin t. 09.05.2009 kl.14.00.

Øll, ið hava áhuga eru vælkomin at verða við til lýsta aðalfundin.

Skrá sambært lógum felagsins.

***Nevndin***

Føroya Astma/Allergifelag

---

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**

## Vilt tú reka kantinuna á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði?

Føroya Studentaskúli og HF-skeið søkir eftir vinnurekandi persóni ella felag, ið vil átaka sær at reka kantinu skúlans.

Vit ynskja okkum eina góða og støðuga tænastu til tey umleið tey umleið 750 starvsfólkini og næmingarnar, ið hava sína dagligu gongd á skúlanum, og eitt fjølbroytt, dygdargott og sunt útboð av mati til ein prís, ið næmingar okkara megna at gjalda.

Afturfyri bjóða vit lagaligar leigutreytir fyri eina góða kantinu við tilhoyrandi køki, útgerð og goymslum.

Er hetta ein avbjóðing, ið tú hevur hug at átaka tær, so fær inn á heimasíðu skúlans www.hoydalar.fo og fá fleiri upplýsingar og kunning um treytir.

Tilboð upp á kantinuraksturin skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. mai.

---

## Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

Aðalfundur verður mánakvøldið 11. mai kl. 19:30.

**Skrá:**

- Aðalfundur
- Býráðsumboðini greiða frá býráðsarbeiðnum
- Ymiskt

**Nevndin**

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

---

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Sosialurin
www.sosialurin.fo